# Dygdargóð tænasta innan ymisk økir

Smápartafelagið Vípan er eitt handilsfelag, sum áhaldandi arbeiðir við at útvega hóskandi vørur til kundan og annars veita tænastur innan ymisk økir. Arbeiðsøkið spennir vítt, og umframt at handla við brotflísum, glasbyggisteinum og innanduraflísum við meira, kann nevnast at teir eisini handla við mold, handilstøðum, seteplum og øðrum til urtagarðin. Kári Lindberg, stjóri á Vípuni er ikki óroyndur innan handilsvirksemi. Hann byrjaði longu afturi í 1977 við Norðoyar Fruktsølu, men innan tílíkan handil er hann at kalla óroyndur. Kári flutti fyri einari tíð síðani virksemið hjá Vípuni í hølini, har Norðoyar Fruktsøla var áður. Fruktsøluna hevði Kári undir hond, men valdi at saðla um og royna okkurt nýtt, tá hann í 2006 keypti Vípuna frá Símuni Gullaksen. Væl hevur gingið hjá hesu nýggju fyritøkuni, og stjórin metir at flytingin frá Klaksvíksvegnum til Víkavegin hevur gagnast teimum væl. Miðað verður eftir at fyritøkan í størst gjørligan mun skal vera heildarveitari innan hetta økið.






















